Tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Jústinus Eidesgaard, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Stefan í Skorini

**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin


# Stovnið ein vanlukkugrunn!

## *Oddagrein*

Vit hava aftur fingið eitt talandi dømi um, at okkum vantar ein -vanlukkugrunn - ella ein katastrofugrunn, sum kanska er tað rættara heitið. -Eftir tað nógva glopraregnið og tey mongu skriðulopini er aftur -spurningurin: -Hvør skal nú betala?

Tey mongu skriðulopini, og tað, at vatnið floymdi yvir her og har, hevur -havt ómetaligan skaða við sær. Skaðar, sum tað tekur langa tíð at gera -aftur, og sum kosta nógv. Harafturat kemur tann menniskjaliga orkan og -ampin, sum eisini ger seg galdandi.

Úr Kalsoynni fréttist, at fleiri túsund litrar av mjólk eru farnir í havið. -Vegirnir eru ikki gjørdir aftur, so bøndurnir norðan til á oynni sleppa ikki -suður á Syðradal við mjólkini. Teir hava tí ikki havt annað val, enn at -skrúva botnventilin frá, og lata mjólkina renna út í Kalsoyarfjørð. Hetta er -ikki bara harmiligt, men stór skomm!

Hetta er so aftur eitt dømi um ábyrgdarloysi hjá myndugleikunum og eitt dømi -um, at okkum vantar eina tilbúgvingarskipan. Ikki fyrr enn týsdagin - eina -viku eftir skriðulopini - vóru menn frá Landsverkfrøðinginum í Kalksoynni og -mettu um skaðarnar. Sjálvandi skuldi hetta verið gjørt beinanvegin. Metti -Landsverkfrøðingurin tá, at tað lat seg ikki gera at bøta skaðarnir -beinanvegin, átti stovnurin at borið so í bandi - helst saman við -Vinnumálastýrinum -, at bøndurnir sluppu av við mjólkina á ein ella annan -hátt - við skipi ella tyrlu.

Okkum er ikki greitt, um bøndurnir bara vera við sviðusoð og missa peningin, -teir annars áttu havt fingið fyri mjólkina, ella um teir kunnu fáa virðið -endurgoldið. Men er eingin trygging á hesum øki, kundi ein vanlukkugrunnur -komið væl við.

Tað sama ger seg galdandi hjá Klaksvíkar kommunu. Fyribils havur tekniska -deildin mett, at tað fer at kosta slakar fimm milliónir krónur at umvæla -skaðarnar, men fleiri skaðar kunnu koma til sjóndar seinri. Klaksvíkar -kommuna hevur ikki pengar tøkar til slíkar ábøtur, og rokningin verður tí -send landsstýrinum. Landsstýrið skal so útvega sær eina eykajáttan, um -landsstýrið samtykkir at ganga umbønini á møti. Eisini í slíkum føri kundi -ein vanlukkugrunnur komið væl við.

Tað sama ger seg galdandi fyri tey, sum eru við í hjálpar- ella -bjargingararbeiði, tá ástendur. Tey kunnu fáa skaða á sjálvan seg, klæði, -bilar ella bátar, og ivi er, um nøkur trygging tekur við. Her eru tí fleiri -dømi um, at vit áttu at stovna ein vanlukkugrunn - ongatíð ov skjótt!

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# Øll skulu hava pláss

At fáa ansingarpláss skal vera ein sjálvfylgja í einum livandi býi.

Tí mugu vit hava sum aðalmál, at øll børn í Tórshavnar kommunu skulu hava tilboð um barnagarðspláss, tá tey ynskja tað.

Og júst tí hevur sosiala nevnd samtykt at økja um ansingarplássini næstu árini, soleiðis at bíðilistin er burtur í 2003. Í hesi ætlan hava vit tikið hædd fyri stóru tilflytingini til høvuðsstaðin, sum eftir øllum at døma fer at halda fram.

Úrslitið av ætlanini er, at vit í Tórshavnar kommunu fáa nøktað tørvin á barnaansing 100 prosent innan hesi trý árini.

At tørvurin á barnaansing verður nøktaður 100 prosent er ein treyt fyri trivnaðinum í einum framkomnum samfelag. Tí er tað einki annað enn nátúrligt fyri okkum í Javnaðarflokkinum, at øll fáa pláss.

### Komin væl áleiðis

Í ár verða 92 barnagarðspláss klár at taka í nýslu. 52 teirra í útbarnagørðum ymsastaðni í býnum, og hini 40 ávikavist í Býlingahúsinum á Ternuryggi og í býlingahúsinum millum Gilja.

Nýggi barnagarðurin í Vesturbýnum letur væntandi upp komandi summar. Í hendan stovnin sleppa 60 børn inn. Ein fyritøka í býnum hevur ætlanir um at gera ein stovn til 30 børn. Hetta verður helst veruleiki um stutta tíð. Tilsamans gevur hetta pláss fyri 162 børnum.

Í løtuni verður arbeitt fyri at fáa fleiri dagrøktarheim, soleiðis at 80 børn afturat kunna fáa tilboð um dagrøktarpláss í verandi dagrøktarskipan.



Ætlandi verður tørvurin á barnagarðsplássum til børn í aldrinum 3-7 ár nøktaður komandi summar. Hetta kemst av, at útbyggingarnar seinastu árini hava verið stovnar til børn í 3-7 ára aldri.

### Fleiri vøggustovur

Nú er tíðin komin til minstu børnini. Vit skulu byggja vøggustovur ella smábarnastovur, soleiðis at foreldur veruliga kunna velja hvørja skipan tey ynskja til síni børn. Møguleiki skal vera fyri frítt at velja millum vøggustovu ella dagrøkt.

Soleiðis skapa vit grundarlag fyri trivnaðinum hjá børnunum, foreldrunum og ikki minst arbeiðsplássunum.

Ein væl virkandi barnaansing, ið nøktar tørvin 100 prosent, er nevniliga til eins stóran fyrimun fyri arbeiðsplássini, sum hon er fyri børn og foreldur. Tí skapar barnaansingin eisini gróður fyri einum livandi vinnulívi.

Fyri at tryggja, at endamálið verður nátt, skal kommunan á hvørjum ári í sambandi við fíggjarætlanina endurskoða málsetningin soleiðis, at útbyggingin av ansingarplássum alla tíðina er í trá við barnatalið í kommununi.

**Elin Lindenskov,**
**býráðslimur og valevni**
**fyri Javnaðarflokkin**
**www.lindenskov.com**

# Króna ella Evra - hava føroyingar onki val?

Danska fólkaatkvøðan um evruna stendur fyri durðum, og enn er rættiliga óvist, hvussu danir fara at atkvøða. Eitt er tó vist, og tað er, at uttan mun til hvussu danir atkvøða, so kemur tað at ávirka okkum: velja danir evruna heldur enn krónuna, so fáa vit eisini evruna sum gjaldoyra; vraka danir evruna, so varðveita vit donsku krónuna sum okkara gjaldoyra. Men hví skulu vit nú tað?

### Fólkaatkvøðan og Føroyar

Danskir politikarar, sum eru ímóti evruni, hava í donskum og føroyskum fjølmiðlum boðað frá, at teir halda at Føroyar og Grønland sum partar av danska ríkinum eisini áttu at atkvøtt á komandi fólkaatkvøðu í Danmark. Landsstýrini í Føroyum og Grønlandi hava hinvegin tikið avgerð um at vit ikki skulu atkvøða, tí vit eiga ikki at avgera, hvussu gjaldoyra hjá dønum skal eita ella síggja út. Hinvegin er tað ein sannroynd, at vit í dag brúka danska gjaldoyrað, og at vit verða rakt, um danir velja evruna.

Tá vit nú siga við danir og umheimin, at vit ikki vilja atkvøða saman við dønum um evruna, so má tað merkja, at vit sjálvi vilja sleppa at avgera, hvussu gjaldaoyrað í Føroyum skal eita og síggja út. At vit so kanska ikki hava so nógv í at velja, tað er ein onnur søk, men eg haldi út frá hesum, at rættast kortini hevði verið, um vit sjálvi gjørdu av, hvat okkara gjaldoyra skal verða, t.d. við einari fólkaatkvøðu í Føroyum, óhefta av donsku fólkaatkvøðuni. Tað má vera tað mest rímiliga, at føroyingar eisini verða eftirspurdir, hvat gjaldoyra vit skulu brúka.

### Eitt føroyskt gjaldoyra?

Sambært føroyskum búskaparfrøðingum, so er nógv sum talar ímóti, at vit føroyingar skulu hava okkara egna føroyska gjaldoyra. Bara umsitingin av einum føroyskum gjaldoyra hevði ivaleyst verið so dýr, at tað hevði verið til størri ampa enn gagn fyri føroyska samfelagið.

Men hóast hettar, so eiga føroyingar sjálvir at avgera hvat gjaldoyra, vit skulu brúka — serliga nú gjaldoyraspurningurin er so nógv frammi í Evropa, og ikki minst tá havt verður í huga, at Føroya Landsstýri arbeiðir við einari ætlan um at Føroyar skulu verða sjálvstøðugt land. Skulu vit hava evruna, krónuna, dollaran ella pundið? Um nú danir velja evruna, so fer ikki at bera til hjá okkum at halda fast um donsku krónuna, tí so verður hon líka so dýr fyri okkum at umsita, sum eitt sjálvstøðugt føroyskt gjaldoyra, og tað hava vit longu frammanundan vrakað.

Eru so aðrir møguleikar? Kunnu vit t.d. ikki brúka norsku ella íslendsku krónuna sum gjaldoyra? Føroyska vinnulívið líkist meira vinnulívinum í hesum báðum londum, enn vinnulívinum í Danmark, so hví ikki? Eg havi sum so slett ikki tikið støðu til, hvussu okkara gjaldoyra skal eita framyvir, men eg haldi vit mugu taka hendan spurningin upp her hjá okkum eisini, skulu vit ikki verða eftirbátar, og enda aftur í einari støðu, har vit fara at kenna tað sum um onkur hevur kroyst nakað oman yvir okkum, uttan okkara, ella kanska ímóti okkara vilja — og so kunnu vit skeldast inn á tað.

### Latið okkum sleppa at velja!

Um nú danir á fólkaatkvøðuni velja evruna sum gjaldoyra, verður evran í somu løtu okkara gjaldoyra. Tá verður sera trupult at velja nakað annað gjaldoyra, og tað er heldur ikki vist at tað tá gagnar okkum at velja eitt annað gjaldoyra. Sambært búskaparfrøðingum er evran eitt betri gjaldoyra fyri føroyingar enn danska krónan. Men hvat gera vit so, um danir hinvegin vraka evruna? So koma vit í eina støðu har vit reelt sjálvi kunnu velja um vit vilja halda fram við donsku krónuni, ella um vit vilja hava evruna — ella okkurt annað gjaldoyra. Danir ætla sær at broyta gjaldoyra, uttan at spyrja føroyingar eftir, so tað má eisini galda hinvegin.

Eg eri sannførdur um, at føroyingar sjálvir mugu sleppa at velja, tí einans á tann hátt fáa vit tað neyðuga orðaskiftið her í Føroyum, sum skal til fyri at vit føroyingar skulu fáa eitt gjaldoyra, ið vit kenna okkum trygg við, og hava nakað forhold til. Latum okkum tí, beinanvegin sum úrslitið av donsku fólkaatkvøðuni fyriliggur, áseta ein dag fyri einari føroyskari fólkaatkvøðu um gjaldoyra. Fáið búskaparfrøðingar at seta upp ein lista við 2-4 gjaldoyrum, sum hóska best til okkara búskap, og latið so okkum sleppa at velja sjálvi — hesa ferð!

**Arnbjørn Ó. Dalsgarð**

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**

**www.sosialurin.fo**



# Onga heimild at hjálpa Klaksvík

*Løgmaður lovar Klaksvíkar kommunu, at skrivið um fíggjarligt ískoyti til at gera skaðarnar eftir glopraregnið aftur verður viðgjørt væl og virðiliga*



EYÐUN KLAKSTEIN

– Vit hava onga heimild ella játtan til at gjalda fyri skaðarnar, sum hendi í Klaksvík í illveðrinum, men vit fara at viðgera málið væl og koma vit til ta niðurstøðu, at landskassin eigur at gjalda ein part, so finna vit neyðugu heimildirnar og pengarnar, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

Fyrradagin sendi Klaksvíkar kommuna honum skriv, har kommunan heitti á landsstýrið um at gjalda ein part av tí, sum tað kostar at umvæla stóru skaðarnar eftir glopraregnið í síðstu viku.

Tekniska umsiting hjá Klaksvíkar kommunu metir, at tað fer at kosta 4,6 milliónir krónur at umvæla allar skaðarnar, men umsitingin vísir á, at tað er sannlíkt, at fleiri skaðar koma undan kavi, tá farið verður rættiliga í holt við umvælingarnar.

Klaksvíkar kommuna heldur, at tá talan er um slíka náttúruvanlukku, sum eingin kann verja seg fyri, eigur landskassin at bera ein part av kostnaðinum fyri umvælingarnar. Og tað var við hesum í huga, at kommunan fyrradagin sendi landsstýrinum skriv um málið.

### Serligt mál

Talan er um eitt prinsippmál, tí í Føroyum er tað ikki vanligt, at landið letur endurgjald til kommunur fyri náttúruskaðar, hóast hetta er vanligt í okkara grannalondum.

Spurningurin er so, um ein slíkir umfatandi skaðar, sum teir í Klaksvík, fara at hava við sær, at landsstýrið skapar eitt fordømi á økinum.

– Tað kundi eisini hent, at ein nógv minni kommuna enn Klaksvík fekk eina stóra rokning fyri skaðar eftir illveður ella skriðulop, og tí mugu vit viðgera skrivið frá Klaksvíkar kommunu væl, áðrenn vit koma til eina niðurstøðu, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

– Hetta verður viðgjørt sum eitt heilt serligt mál, og møguliga kemur tað at skapa eitt fordømi fyri framtíðina.

# LV má fáa fleiri pengar

Landsstýrið hevur latið fíggjarnevndini hjá løgtinginum eitt fíggjarnevndarskjal, har søkt verður um eina eykajáttan til Landsverkfrøðingin.

Orsøkin til hetta eru skaðarnir, sum hendu mánadagin fyri 10 døgum síðani, tá tað regnaði sera illa, og nógv skriðulop vóru kring landið.

Vegir fingu skaða, og Landsverkfrøðingurin hevur tí brúk fyri fleiri pengum, fyri at kunna gera skaðarnar aftur.

Landsstýrið søkir tí um 4,3 milliónir krónur afturat til Landsverkfrøðingin.

**ek**

# Norðborg fiska kvotuna

*Norðborg landaði í gjár 850 tons av flaki í Ålesund, og fer í kvøld til fiskiskap eftir makreli*

Norðborg hevur síðani miðskeiðis í august mánaði trolað eftir sild í norskum sjógvi Í gjár kom nótaskipið inn til Ålesund í Noregi, har 850 tons av flaki vórðu løgd upp.

Norðborg hevur gjørt tríggjar túrar síðani 12. august, og nú er sildakvotan uppi.

Tá vit tosaðu við reiðaríið í gjár, roknaðu teir við, at Norðborg fór aftur til fiskiskap í kvøld. Nú verður tað makreli, Norðborg fer at royna eftir í norskum sjógvi.

**ek**





Okkara vitan er tín trygd

- tá íløgan skal gerast

Føroya Banki hevur nú møguleika at bjóða tær at taka lut í keyp og sølu á altjóða virðisbrævamarknaðunum.

Føroya Banki hevur tikið upp samstarv við íløgufelagið Bank-Invest, ið er millum elstu og størstu fyritøkur av sínum slag í Danmark.

Eitt íløgufelag, ið er eitt felag, har fleiri íløgufólk ganga saman, er ein góð loysn hjá fólki, ið hava eitt ávíst avlopsgjaldføri og ynskja virkna røkt av íløgunum, men hava ikki tíð og orku ella innlit í virðisbrævahandil.

Í Føroya Banka er tín íløga í hondum hjá fólki við sakkunnleika innan virðisbrævahandil. Tí er okkara vitan tín trygd, tá íløgan skal gerast.

Er hetta nakað fyri teg, er tú vælkomin at seta teg í samband við fíggjardeild bankans.

FØROYA BANKI

Húsagøta 3 • Postboks 3048 • FO-110 Tórshavn • Tel 31 13 50 • Fax 31 58 50
e-mail: fbk@post.olivant.fo • www.foroyabanki.fo